# Søgan um ein ringkópanósa



Fyrstu ferð, hesar myndirnar vórðu almannakunngjørdar, var hildið, at talan var um ein steinkópanósa *Phoca vitulina*; men eftir at myndirnar vórðu viðgjørdar, hava nakrir serfrøðingar frá NAMMCO hugt at myndunum og teir siga, at talan er um ein ringkópanósa *Phoca hispida*.

Summarið 2003 arbeiddi Sólfinn Kjærbo við nakrar laksaaliringar, ið lógu við Núpin í Vági. Sólfinn legði tá til merkis ein serliga lítlan nósa, ið royndi at aka seg upp á ein av aliringunum. Nósin var umleið 70 cm. langur. Sólfinn glúpaði nósan og tók hann umborð á fóðurbátin, har Linda Holm, Vágur, Suðuroy, tók nakrar myndir av honum. Eftir at tey sleptu nósanum aftur, helt hann til við aliringarnar í umleið eina viku.

Ringkópur er ein arktiskur kópur, sum ynglar í kavaholum á ísinum og hann er tann minsti kópurin, ið finst á norðurhálvuni.

Hóast ringkópur ikki er vanligur í Føroyum, er hann skrásettur her nakrar ferðir. Í tíðarskeiðnum 1963-67 fingu menn premiu fyri at skjóta kóp og tá komu 5 undirkjaftar av ringkópi inn.

Í 1980'unum helt ein spakur ringkópur til við Laksaaling í Oyri. Hann var komin hagar av sær sjálvum. Eftir eina tíð varð hann var koyrdur í eitt stórt kar, har hann varð verðandi, til hann doyði av einum óhappi. Um sama mundið sást ein ringkópanósi á sama stað við Oyri.

05.12.2002 varð ein ringkópanósi avmyndaður í Vestmanna, og endiliga hava vit hendan úr Vági, sum Sólfinn Kjærbo fangaði.

Ein 20 ára gomul møgulig eygleiðing av einum ringkópi í Sørvági fyriliggur; men hon kann ikki prógvast.

Á myndunum síggjast Petur Erhard Kjærbo úr Vági í Suðuroy, sonur hansara Trúgvi og steinkópanósin.

*Kelda: J-K. J., Andrias Reinert, Bjarni Mikkelsen og fleiri.*